## Klaksvíkar Sløkkilið



### Søkt verður eftir sløkkiliðsfólki til Klaksvíkar Sløkkilið

**Við hesum verður søkt eftir sløkkiliðsfólki til Klaksvíkar Sløkkilið**

**Uppgávur/arbeiðsøki:**
- Sløkkja eld
- Frígering av fólki í bilum
- Ymiskar froskmannauppgávur
- Oljuupptøka á sjónum
- Stormskaðar og mangt annað

**Førleikar/eginleikar**
- Tú skalt vera í aldrinum 20 til 35 ár
- Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Tú skalt vera álitisfólk og álítandi
- Tú skalt duga væl at arbeiða við menniskjum
- Tú skalt vera fyrikomandi og hava samstarvsvilja
- Helst hava stóra koyrikortið
- Helst handverkaraútbúgving

Umsóknir skulu vera sløkkiliðnum í hendi **3. juli 2006**

Áhugaðir umsøkjara kunnu spyrja seg fyri hjá
Finn Hansen sløkkiliðsleiðara - Tlf. 280112

Umsóknir skulu sendast til
***Klaksvíkar Kommuna***
***Klaksvíkar Sløkkilið***
***Nólsoyar Pállsgøta 2***
***FO 700 Klaksvík***

Stutt um Klaksvíkar Sløkkilið.
Klaksvíkar Sløkkilið fevnir í dag um íalt 16 sløkkiliðsmenn, sum eru á tilkallivakt.
Sløkkiliðsleiðarin, sum er í fullum starvi, hevur ein 1. og ein 2. varaleiðara.
Umframt útrykningar fevnir sløkkiliðsarbeiðið um venjingar av og á og til tíðir onkur serlig umvælingararbeiði. Sløkkiliðsstøðin liggur miðskeiðis í Klaksvík við Kirkjubrekku 11.

creð 458006

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | klaksvik.fo

## Mylnuhúsið

### søkir eftir pedagogum til Sornhúsið

Søkt verður eftir tveimum pedagogum, at byrja 15. august 2006 ella skjótast tilber..

Mylnuhúsið er ein samskipaður dagstovnur við vøggustovu, barnagarði, útibarnagørðum og frítíðarheim.
Vit taka dagliga ímóti 138 børnum í aldrinum 0 – 9 ár. Í Mylnuhúsinum er pláss fyri at bæði børn og vaksin kunnu seta síni spor her, vit arbeiða í tí dagliga við okkara eygleiðingarevnum og eru upptikin av, hvat upptekur børnini, fyri síðan at leggja dagin til rættis út frá tí og leggja vit stóran dent á, at varða um øll børnini.

Størvini eru 30 tíma størv (møguleiki er fyri fleiri tímum) í Sornhúsinum sum er frítíðarheimið hjá Mylnuhúsinum .
Í Sornhúsinum geva vit pláss fyri teimum skapandi evninum hjá børnunum , hetta gerða vit við at lata børnini sjálvi seta sín dám á aktivitetirnar, sum eru á teimum ymisku verkstøðunum.

**Vit søknast eftir fólki ið er:**
- fleksibul
- hevur opið sinni
- sær møguleikar fram um mørk
- tekur støði í barninum
- tekur barnið í álvara
- er opin fyri nýhugsan
- leggur stóran dent á gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum, kommunurnar og Føroya Pedagogfelag.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hanna Thøgersen leiðara tlf. 217789 ella Maja Højsted deildarleiðara telefon 218878 .

*Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarka starv*

Umsóknir til starvið, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi, seinasta lagið fríggjadagin 30. juni 2006

Mylnuhúsið
Mylnugøta 10 · 700 Klaksvík
mylnuhusid@mylnuhusid.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## ÚTBJÓÐING

**Við hesum verður arbeiðið Fiskivinnuskúlin í Vestmanna boðið út í almenna lisitatión.**

Arbeiðið verður boðið út sum stórarbeiðstøka (jørð- og kloakk, betong, stál, timbur, snikkari og glas) og fakarbeiðstøka (HVS, El, málari og gólv).

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 10. juli 2006 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 9181 – 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er sent aftur óskalað í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina, tað er 31. august 2006.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5, Tórshavn, hósdagin 24. august 2006 kl. 14.00.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
100 Tórshavn

sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801 lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

## VAKTARFÓLK

Søkt verður eftir vaktarfólki at arbeiða í eysturoynni. Talan er um kv./ náttararbeiði. Koyrikort eins og reina revsuváttan krevst.

Frí annaðhvørt vikuskiftið.

Nærri upplýsingar fáast á telefon 505061 ella 505060

ANSNI TRYGDARFELAG
ANSNI · POSTBOKS 2032 · 165 ARGIR

Sosialurin
www.sosialurin.fo